## Sir Salman Rushdie

Herfyri gjørdi enska drotning Elizabeth álvara av síni ætlan at lata rithøvundanum Salman Rushdie høgt virda riddaraheiðurin Order of the British Empire. Tá enska kongshúsið í fjør boðaði frá ætlanini um at heiðra Rushdie, svaraðu muslimskar rødddir aftur við hóttan-um um sjálvmorðsbumbur. Fyri nógvar muslimar stendur skaldsøgan hjá Rushdie »The Satanic Verses« nevniliga enn sum ein eyðmýkjandi háð av Koranini. Í bókmentaheiminum verður kongaliga viðurkenningin av Rushdie sæð sum ein stórur sigur fyri tali og skrivifrælsi.



*Við bretska OBE heiðrinum kann umstríddi rithøvundurin nú kalla seg Sir Salman Rushdie*

## Glistrup planlegði egna jarðarferð

Mogens Glistrup, stovnari av danska Framburðsflokkinum, sum doyði mikudagin í farnu viku, hevur sjálvur valgt sálmarnar, ið skulu syngjast í Sorgenfri Kirke í dag. 'Dejlig er Jorden' og 'Den signede dag' skulu syngjast, umframt at 'Altid frejdig når du går' eisini verður sungin. Til jarðarferðina í dag vóru millum annað Søren Espersen, Søren Krarup og Jesper Langballe úr Danska Fólkaflokkinum, meðan formaðurin Pia Kjærsgaard ikki var til staðar.

# Sigrun Gunnarsdóttir vekir ans í Japan



*Frá móttøkuni á listaframsýning hjá Sigrun Gunnarsdóttir í Nagoya University of Arts í Japan*

**Eftir at hava selt fleiri málningar á eini listaframsýning í Japan, spyr nú enn eitt japanskt savn eftir verkum hjá føroysku listakvinnuni Sigrun Gunnarsdóttir**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Føroyska listakvinnan Sigrun Gunnarsdóttir vekir nú rættiligan ans í Japan. Herfyri keypti Nagoya University of Arts tríggjar av hennara málningum, eftir at hon hevði havt eina framsýning í býnum. Áhugin fyri framsýningini hevur nú eisini við sær, at enn ein listaframsýning við verkum eftir Sigrun Gunnarsdóttir letur upp í japanska býnum Gifu í september mánaða.

### Óvanligt tilboð

Tað var eitt tilboð, Sigrun Gunnarsdóttir ikki kundi siga nei til, tá hon í juni mánað fekk møguleikan at fara til Japan at arbeiða og vísa sína list fram. Tilboðið fekk hon, eftir at hava tikið lut á einum donskum listaverkstaði, har nakrir listakønir japanar høvdu fingið eyga á listina hjá føroysku listakvinnuni.

Sum listafólk ført tú neyvan eitt betri tilboð, og Sigrun Gunnarsdóttir ivaðist heldur ikki í at taka av. Í seks vikur slapp hon at ráða yvir egnum atelieri, beint í einum serliga kveikjandi listaumhvørvi á universitetinum í japanska býnum Nagoya við møguleika at sýna fram í einum stórum framsýningarhøli.

- Har vóru serliga nógv ung fólk, og tað gevur altíð nýggjan og spennandi íblástur. Og sjálvandi var tað eisini nakað heilt serligt at arbeiða saman við japanum. Tú lærir ótrúliga nógv av at arbeiða saman við fólkum, sum hugsa heilt øðrvísi, enn tú sjálv, sigur Sigrun Gunnarsdóttir.

### Við nýggjum eygum

Sjálv heldur Sigrun Gunnarsdóttir, at hon flutti seg ikki sørt sum listakvinna hesar vikurnar. Millum annað royndi hon seg við at flætta ymisk japansk tekn inn í málningarnar.

- Tað eru jú ymsir mátar, tú kanst flyta teg sum listafólk. Í Japan upplivdi eg eisini eina enn sterkari kenslu við teimum myndevnum, eg longu arbeiði við frammanundan. Ofta skalt tú jú burturfrá fyri at síggja tað vælkenda við øðrum og nýggjum eygum, greiðir listakvinnan frá.

Nú stendur henni so í boði at sýna fram í Japanska býnum Gifu í september mánað. Sjálv heldur Sigrun Gunnarsdóttir tað vera ringt at meta um, hvat hevur vakt japanska áhugan fyri hennara list, men onkrar ábendingar hevur hon fingið.

- Tey hildu mína list vera øðrvísi. Ofta fekk eg eisini at vita, at mínir málningar tóktust so róligir, sigur Sigrun Gunnarsdóttir.

Hvat næsta framsýningin í Japan hjá føroysku listakvinnuni fer at føra við sær, er ilt at spáa um. Fyribils fegnast Sigrun Gunnarsdóttir bara um eina sera stóra uppliving, og at hon á hendan hátt kanska hevur verið við til at lata eina forkunnuga dyr upp fyri føroyskari list úti í heimi.





*Eyðkendu málningarnar hjá Sigrun Gunnarsdóttir eru eisini at síggja á Summarframsýningni í Norðurlandahúsinum hendan mánaðin*


## Skrivstovulærlingur

Søkt verður eftir skrivstovulærlingi, at byrja eftir summarfrítíðina.

Áhugað kunnu senda umsókn saman við prógvum og møguligum viðmælum til:

**P/F ArtiCon**
Postboks 3109
110 Tórshavn

Umsóknir skulu verða P/F ArtiCon í hendi innan, **mánadagin 14. juli 2008.**

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at tosa við Niclas Joensen, tel. 350 700 ella 21 61 69.

Sosialurin 341800

ARTICON
**á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn**
**tel. 350700 · fax 350705**